# Fríggjadagurin verður sera áhugaverdur

*Støðan eftir fýra umfør og samansetingin av dystum í fimta umfarinum ber møguleika í sær fyri, at kappingin fer at skrædna dýra biðjudag*



*Skal metast eftir úrslitunum higartil í kappingini, verður VB eitt av toppliðunum hetta kappingarárið*
***Mynd: Áki Bertholdsen***

Munurin millum toppin og botnin í 1. deild er so mikið stórur, eftir at fýra umfør eru spæld, at tað ber væl til at ímynda sær, at deildin er skrædnað, tá fimta umfar er spælt fríggjadagin, sum er dýri biðjudagur.

B36 hevur fulla ferð á, og teir mugu finna seg í at verða mettir sum upplagdir favorittar, tá teir fara í Sandoynna. Um B36 vinnur á Sandi, so er møguleikin stórur fyri, at teir vera eini fimm stig frammanfyri næstfremstu liðini.

Hetta verður soleiðis, um B68 ikki vinnur í Klaksvík (har plaga teir ofta at fáa javnleik), og um HB ikki fær fulla úrtøku burturúr – bæði í útsetta dystinum móti FS Vágum og heimadystinum móti VB. Og so mugu tey, sum ikki eru B36 viðhaldsfólk og sum tískil vóna, at tað kemur spenningur í, líta á søguna, sum gongur á høkjum, og sum sigur, at hjá B36 er tað sum hjá smálombunum. Tað gongur leikandi lætt og vøksturin er stórur tíðliga á árinum, men tá tað líður út á heystið, verða tey slaktað!

Syndarliga bilvanlukkan í Vágum kastaði skuggar yvir óvanliga veðurgóða sunnudagin. Heimadysturin hjá vágaliðnum móti HB varð útsettur, og vit hava skilt, at tað ikki enn er avrátt, nær hann verður á skránni.

**Toppurin**
Sumba bumbað er beinrakna yvirskriftin yvir øgiligu eyðmýkingini, sum B36 gav sumbingum.

At skora ellivu mál í einum og sama dysti er ikki hvønn dags kostur, og tað er ikki minni hugaligt hjá B36, tá tað eru so nógvir spælarar, sum skora málini, sum tað vóru í góðveðrinum í Gundadali.

Stóri spurningurin hjá bæði teimum í B36 og øllum øðrum er, um B36 verður á sama støði, sum teir hava verið, tá liðformaðurin og besti spælarin hjá teimum tey seinnu árini, John Petersen, ikki verður við meiri. Sjálvandi verður B36 uttan John Petersen ikki tað sama sum B36 við John Petersen, men um hetta fer at hava stórt árin á úrtøkuna, fáa vit at síggja tær komandi vikurnar.

HB helt frí í vikuskiftinum. Tað dragnaði fram til grannarnar í B36, men tá havt verður í huga, at trý stig verða latin fyri at vinna, so kann tað vera so skjótt, at HB tekur seg fram á B36. Stóra styrkisroyndin nærkast. 10. juni, sum er páskaaftan, eigur B36 heimadyst móti HB.

B68 er á øðrum plássi. Teir høvdu tyngdina at koppa sandoyingum, og um tað eydnast at koma úr Klaksvík uttan at tapa, so sær tað heilt ljóst út hjá toftamonnum. Súni Fríði Johannesen, sum skoraði øll málini móti B71, sigur í blaðnum í dag, at um teir í B68 skulu blanda seg í toppin, so skulu teir hava nógv stig undan summarsteðginum. Harvið endurtekur álopsmaðurin tað, sum Jóannes Jakobsen hevur sagt um, at hópurin hjá B68 er ikki nóg breiður.

VB má roknast upp í toppliðini. Eftir sigurin á NSÍ hava teir sjey stig, og tað er ikki at undrast á, um teir í Vági í hesi vikuni iðra seg eyka nógv um, at teir so at siga lorkaðu trý stig burtur, tá teir í øðrum umfari taptu á heimavølli móti sandoyingum. Vágbingar hava ofta staðið seg væl í Gundadali móti HB, og í ár hevur VB so mikið góða manning, at tað kann gerast spennandi fríggjadagin.

**Lítil miðja**
Tað ber illa til at tosa um nakra miðju í bestu fótbóltsdeildini. Um nøkur miðja er, so eru tað GÍ, NSÍ og B71, sum hava fimm og fýra stig.

Gøtumenn megnaðu ikki at koppa illa kroysta KÍ liðnum, men hóast tað ikki gekk hesa ferð, so vóru tað manningarligar ábendingar um, at GÍ kann fara at toga seg longri upp á støðutalvuni.

Men tað verður torført hjá gøtumonnum, sum fríggjadagin skulu til Runavíkar. At spæla móti einum liði, sum akkurát hevur tapt, er altíð torført. NSÍ tapti í Vági, og bæði tað og so tað, at tveir av spælarunum, sum eru uppvaksnir í felagnum, nú spæla við GÍ, fer ivaleyst at gera tað lætt hjá Trygva Mortensen at seta sínar spælarar upp.

Sanoyingar taptu á Toftum, men teir vóru ongantíð niðurspældir. Liðið er soleiðis fyri, at teir fara sjáldan at verða roknaðir millum favorittarnar, men samstundis hava teir evni til at arga øll hini liðini.

**Botnurin**
Klaksvíkingar mugu finna seg í framvegis at vera roknaðir millum botnliðini. Har vera teir neyvan leingi afturat. At teir megnaðu málleysan javnleik í Gøtu plagar at verða roknað sum eitt hampuliga gott úrslit. Trupulleikin hjá klaksvíkingum er, at teir hava tapt fýra stig á heimavølli. Tað plaga teir ikki at gera.

Fríggjadagin fær KÍ ein nýggjan møguleika á heimavølli, men tað verður strevið móti B68 sum ofta hevur staðið seg væl í Klaksvík.

Umstøðurnar gjørdu, at vágamenn hildu frí. Støðutalvan boðar frá, at teir eru kroystir, og talan verður um botngysara, tá teir fríggjadagin fara til Sumbiar.

Tvey tey næstu umførini verða sera týdningarmikil fyri sumbingar, sumbingar. Teir tóktust spara upp á krútið, tá teir vóru í Gundadali. Lagnan hjá teimum í bestu deildini er nógv tengd at, hvussu tað fer at hilnast, tá teir fáa vitjan av FS Vágar og síðani av B71.

# Avstað mikudagin

*At byrja við verður tað tó bert um vikuskiftini, at John Petersen verður í Íslandi*

JÁKUP MØRK

Hóast trivaliga sigurin á sumbingum sunnudagin, so var kortini ein ferðil av ótta yvir B36 áskoðarunum.

Orsøkin var tó ikki frammanfyristandandi uppgávan, men heldur tann sannroynd, at tosað varð um, at hetta var seinasti dysturin hjá John Petersen fyri árstalsfelagið.

Fyri viku síðani bórust tíðindi um, at Íslendska Leiftur, har Jens Martin Knudsen er venjari, samráddist við B36 og John Petersen, um at fáa álopsmannin í hópin.

Íslendsku miðlarnir skrivaðu, at hetta var ætlað at tippa holið í álopspartinum, eftir at Uni Arge í vetur valdi at skifta felag.

At íslendingarnir eru grammir eftir at fáa John í hópin, verður undirstrikað av, at fyrstu vikurnar skal føroyinguyrin bert vera í Íslandi um vikuskiftið.

Hetta tí hann í í hesum døgum leggur seinastu hond á útbúgving sína á Læraraskúlanum, og at hann tískil eisini má vera til prótøku her heima.

Ætlanin er so, at hann um vikuskiftið skal spæla við Leiftri, meðan hann í miðvikuni venur við B36.

**Ynskir tað besta**
Sjálvur sigur John, at um hann skal gera dreymin um fótbóltstilveruna til veruleika, so er tað um at vera seinasta útkall, og tí valdi hann at taka av tilboðnum.

- Sjálvandi er tað eitt sindur hugstoytt at fara avstað nú, tá vit liggja fremst í landskappingini, men eg vóni og rokni við, at teir megna at halda fast um oddasessin kortini, sigur John Petersen.

Skemtandi leggur hann afturat, at sjálvur hevur hann spælt í fremstu deildini í 7 ár, men at hann ongantíð hevur megnað at skotið fýra mál í einum og sama dysti.

Við hesum sipar hann sjálvandi til avrikið hjá liðfelaganum, Bjarna Prior, sum sunnudagin røkti álopssessin hjá John, meðan hesin var á miðvøllinum.

**Nøgdur**
Aloftast er torført at fáa neyvar upplýsingar um lønarviðurskiftini, tá slíkir sáttmálar verða skrivaðir, og soleiðis er eisini í hesum føri.

John sigur tó, at hann er nøgdur við sáttmálan, sum gevur honum møguleika at savna alla orku sína um fótbóltin.

**Takkar fyri seg**
At enda biðjur John okkum heilsa viðhaldsfólkunum hjá B36, við tøkk fyri tíðina í felagnum, og ikki minst klappini hann fekk, tá hann stutt fyri leiklok varð útskiftur sunnudagin.

Standandi fagnaðu áskoðararnir leikarunum, sum, síðani hann kom til felagið í 1997, hevur verið ein hin týdningarmesti á liðnum, og sum í ár hevur verið liðformaður á liðnum.

- Eg spurdi Pelle, um tað var gjørligt at skifta meg út stutt fyri leiklok, og hesum játtaði hann, og tað eri eg sera fegin um, sigur John Petersen at enda.



*John Petersen takkar áskoðarunum fyri hesuferð, og áskoðararnir svaraðu honum eisini aftur*
***Mynd: Álvur Haraldsen***

# Sumba bumbað

*1. deild: B36 nýtti eitt lítið korter til at avgera dystin sunnudagin, og eftir hetta tóktist einasti spurningurin vera, hvussu stórur heimasigurin skuldi verða*



*B36 leikarar fegnast um hat-trickið hjá Bjarna, meðan Eigil Olsen tykist heldur vónbrotin av verju síni*
***Mynd: Álvur Haraldsen***

JÁKUP MØRK

B36-Sumba 11-1 (7-0)

Ikki kann sigast, at spenningurin var stórur í Gundadal sunnudagin. B36 blásti beinanvegin sumbingarnar av vøllinum, hóast teir vóru eitt sindur skerdir, tí Jens Kristian Hansen varð spardur, og als ikki var í hópinum.

Í hansara stað varð John Petersen settur á miðvøllin, meðan Bjarni Prior røkti álopssessin. Kanska eisini eitt sindur taktiskt, tá hetta eftir øllum at døma var seinasti dysturin hjá John fyri B36.

Líkt er nevnliga til, at hann í vikuni fer til Íslands, har hann skal spæla við Leiftri, og tá 10 minuttir vóru eftir av dystinum sunnudagin, varð hann heiðraður av áskoðarunum, sum standandi klappaðu fyri liðformanninum, tá hann varð skiftur út.

Sumbingarnir vóru rættuliga skerdir, tí fleiri av lyklaleikarunum í løtuni dragast við skaðar.

Um dystin sjálvan er ikki tað stóra at siga. Tølini siga eisini, at himmalvíður munur var á avrikunum hjá liðunum báðum, og við eitt sindur størri neyvleika kundi sigurin verið í minsta lagið tvífalt so stórur.

Niðanfyri verður greitt frá, hvussu einstøku málini komu, og meðan hetta helst er hugaligur lesnaður hjá teimum á heimaliðnum, eiga sumbingar helst at gloyma alt um dystin sum skjótast.

**1-0, Ronnie Samuelsen, 5. min**
Bjarni Prior varð sendur avstað í høgru síðu, haðani hann sendi bóltin innfyri. At síggja til fór Eigil Olsen nakað skeivur av bóltinum, og so fekk Ronnie lætt spæl at leggja heimaliðið framum.

**2-0, John Petersen, 8. min**
John fekk fatur á bóltinum á miðjum vølli. Hann dróg fram við tveimum ella trimum mótstøðuleikarum. Hann varð takladur, men bólturin stakk beint til Ronnie, sum legði bóltin inn um verjuna, har John dróg fram við málverjanum, áðrenn bólturin varð lagdur í netið.

**3-0, Bjarni Prior, 14. min**
Herbert í Lon Jacobse rak nakað niðan á vøllin, áðrenn hann sendi Magna á Lakjuni avstað í vinstru. Magni var so at siga púra leysur, og komin oman á baklinjuna trillaði hann á tvørs til Bjarna Prior, so hesin hevði lætt spæl.

**4-0, Bjarni Prior, 20. min**
B36 vann sær hornaspark í vinstru síðu. Jákup á Borg varð settur at skjóta, og tá bólturin kom innfyri, var Bjarni fyrstur á.

5-0, Bjarni Prior, 24. min
Staddir uttarlaga í høgru, spæla Jákup og Magni fikst sínamillum. Endin verður, at Magni sleppur púra leysur móti sumbiarmálinum, og tá málverjin kemur ímóti, verður trillað upp á tvørs til ein enn fríari Bjarna Prior, sum sostatt fekk sítt hat-trick.

**6-0, Jákup á Borg, 41. min**
Bólturin varð spældur úr verjuni upp til Jákup, sum var staddur á miðjum vølli. Hann sendir beinanvegin Bjarna avstað, og heldur síðani sjálvur beina kós móti málinum, soleiðis at hann ótarnaður kundi stýra flata innlegginum frá Bjarna í netið.

**7-0, Magni á Lakjuni, 45. min**
Tríggir B36 leikarar sleppa púra leysir oman móti sumbiarmálinum. Bjarni Prior hevði júst tá brent einar tveir risamøguleikar, og hesuferð valdi hann so at trilla upp á tvørs til Magna, og á tann hátt siga takk fyri 5-0 málið, har samanspælið var hitt øvugta.

**8-0, Bjarni Prior, 56. min**
Uttan iva vakrasta málið í dystinum. Bjarni hevði sjálvur bóltin stutt inni á sumbiarhálvuni. Hann skifti yvir til Magna, sum var staddur í vinstru. Magni legði ein skrúvandi bólt inn um verjuna, har Bjarni rennandi við fullari ferð seti høvdið á bóltin, sum uttan møguleika hjá málverjanum fór sendandi í málið.

**9-0, Jan Guttesen, 61. min**
Úr høgru sendi Carl ein høgan bólt innfyri. Í brotsteiginum var Bjarni Prior hægstur, og skallði hann bóltin niður til Ronnie, sum lat bóltin fara víðari har Jan langaði vinstra beinið á. Til stuttleikar kann nevnast, at talan var um fyrsta málið hjá Jan, síðani hann kom á fyrsta lið hjá B36.

**10-0, Jákup á Borg, 84. min**
Sum ikki einaferð, varð bólturin sleptur inn um sumbiarverjuna, har vanliga trygga rangstøðufellan als ikki riggaði sunnudagin. Magni á Lakjuni varð púra fríur, men ósjálvssøkið trillaði hann tvørtur um til Jákup á Borg, sum hevði lætt við at skjóta næsta mál sítt.

**11-0, Carl Herup Høgnesen, 84. min**
Jákup á Borg fekk bóltin á miðjum vølli, og eftir at hava driblað framvið tveimum sumbingum, varð bólturin stungin inn um verjuna. Bjarni dróg ov langt, tá hann skuldi fara fram við málverjanum, men Carl var skjótur á bóltinum og rættaði kósina.

**11-1, Sasa Tomajék, 90. min**
Sasa fekk bóltin á miðjum vølli, og eftir at hava driblað framvið tveimum mótstøðuleikarum, spældi hann bandaspæl, áðrenn hann púra leysur kundi skjóta bóltin framvið Trónda. Sostatt fingu sumbingarnir troystarmálið, sum hevði ligið í luftini leingi, men fram til tá, hevði Tróndur vart fyri øllum royndunum

**B36-Sumba 11-0 (7-0)**
1-0 Ronnie Samuelsen, 5.
2-0 John Petersen, 8.
3-0 Bjarni Prior, 14.
4-0 Bjarni Prior, 20.
5-0 Bjarni Prior, 24.
6-0 Jákup á Borg, 41.
7-0 Magni á Lakjuni, 45.
8-0 Bjarni Prior, 56.
9-0 Jan Guttesen, 58.
10-0 Jákup á Borg, 91.
11-0 Carl Herup Høgnesen, 84.
11-1 Sasa Tomajék, 90.

Dómari: Petur Reinert

**B36:**
Tróndur Vatnhamar - Mikkjal Thomassen, Egil Zachariassen, Herbert í Lon Jacobsen - Carl Herup Høgnesen, Jan Guttesen, John Petersen, Magni á Lakjuni - Jákup á Borg, Ronnie Samuelsen, Bjarni Prior

**Sumba:**
Eigil Olsen - Mortan úr Hørg, Nikola Biberdzic, Bergur Vinther, Marlon Kjærbo, Hallur Dam Joensen - Jan Poulsen, Sasa Tomajek, Nikola Biberdzic, Hans Jacob Thomsen - Rene Thomsen



*Heldur ikki í triðja umfarinum bragdaði hjá Royn, sum nú er einsamalt í botninum*
***Mynd: Áki Bertholdsen***

# Royn stigaleyst

*2. deild: Nú trý umfør eru leikt í aðru deild, eru hvalbingar um at verða isoleraðir í botninum*

JÁKUP MØRK

Royn-LÍF 0-1 (0-1)

Triðja dystin av eins nógvum møguligum, noyddust hvalbingar at fara stigaleysir av vøllinum, tá teir leygardagin høvdu vitjan av leirvíkingum.

Royn er sostatt niðasta liðið í 2. deild í løtuni, og skal peikast á nakra einstaka orsøk til hetta, má svarið vera, at hvalbingarnir fáa ikki mál.

Fyri viku síðani vórðu teir hølvaðir av í Havn, tá teir vitjaðu hjá HB, men áðrenn havnarmenninir sluppu fram um ta ferðina, høvdu hvalbingar misnýtt fleiri heilt góðar møguleikar.

**Brendu nógv**
Hesu ferð vildu fleiri eisini vera við, at Royn átti at fingið í øllum førum annað stigið, og tá vit frættu frá leirvíkingunum, so vóru teir í øllum førum ikki ónøgdir um tepra sigurin.

Í fyrra hálvleiki gekk hampuliga javnt á, og talan varð ongantíð um teir heilt stóru møguleikarnir. Báðir partar royndu seg við nøkrum skotum, men fram til 41 minuttir vóru leiktir, var ongantíð rættuligur vandi á ferð.

Tá mistók aftasti maður hjá hvalbingum seg, so hann ikki fekk skot á bóltin, tá hesin skuldi sparkast burtur. Úrslitið varð, at Kristian í Vági slapp at halda einsamallur móti málinum, og skeyt hann einasta málið í dystinum.

Í seinna hálvleiki royndu hvalbingar at trýsta, men Trugvi Olsen í LÍF málinum tók sær av øllum. Serliga móti endanum stóð nógv á seinasta korterið, tá hvalbingar royndu at trýsta, men hinvegin opnaði hetta eisini fyri møguleikum í hinum endanum. Leirvíkingar vóru einar tvær ferðir leysir við málverjanum hesa løtuna, men tað eydnaðist teimum tó ikki at økja um leiðsluna.

**Botnslag komandi vikuskiftið**
Við sigrinum fingu leirvíkingar fyrsta sigurin á árinum, so nú er um ikki annað skjøtul settir á klintranina upp eftir stigatalvuni. Um teir so aftur megna at seta seg á medaljusess, fara komandi vikurnar at vísa. Næsta uppgávan er at taka ímóti EB/Streymi, sum hevur fingið eina hampuliga byrjan upp á kappingarárið.

Hvalbingar tykjast hinvegin illa sperdir, nú teir at kalla eru isoleraðir í botninum.

Enn er sjálvandi stutt fráliðið í kappingarárinum, men hinvegin skulu teir heldur ikki dragna ov nógv, um teir skulu gera sær vónir um at blanda seg ovarlagari á stigatalvuni. Komandi vikuskiftið skulu teir vitja klaksvíkingar, sum eisini hava fingið eina vánaliga byrjan upp á kappingarárið, og møguliga verður hesin dysturin eitt gott barometur fyri, hvussu hesi bæði liðini fara at standa seg hetta kappingarárið.

**Royn-LÍF 0-1 (0-1)**
0-1 Kristian í Vági